# SJÓNVARPIÐ SENDIR BEINLEIÐIS

**Sjónvarpið fer leygarkvøldið at senda beinleiðis frá hálvfinaluni í Prix Føroyum. Hetta er fyrsta umfarið í hesum Prixnum, sum veruliga verður dekkað í sjónvarpinum**

Í LUFTINI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



Bæði Útvarpið og Sjónvarpið senda beinleiðis frá hálvfinaluni í Prix Føroyum leygarkvøldið.
Mynd: Jens Kr. Vang

Fimm tímar við tónleiki, kapping og spenningi. Tað fer Sjónvarpið at bjóða hyggjarum sínum leygarkvøldið. Maratonsendingin frá hálvfinaluni í Prix Føroyum byrjar klokkan 21.00, og sambært skránni skal hon varða heilt til klokkan 02.00 sunnumorgunin.

Átta bólkar skulu á pallin at spæla, og tónleikurin hjá øllum hesum átta bólkum verður varpaður út í føroysku stovurnar. Síðani verður bíðað eftir avgerðini í kappingini, sum kemur tíðliga á náttini.

Hetta er fyrsta kappingin í hesum Prixnum, sum Sjónvarpið av álvara dekkar á sjálvum skíggjanum. Sjónvarpið hevur havt onkur smærri innsløg frá innleiðandi kappingunum, men Prix-sendingarnar, sum plagdu at verða, hava ikki verið gjørdar hesaferð.

## Netvarp

Ístaðin hevur Sjónvarpið roynt at framleitt netvarp – tað hava verið innsløg framleidd til at taka niður á telduna umvegis internetið.

Hetta hevur verið ein nýggj roynd at gera tilfar til fremsta málbólkin í Prix Føroyum – tey ungu. Men nú kunnu eisini tey tilkomnu uttan skjótt internetsamband síggja Prix-framførslur.

Sjónvarpið hevur seinnu árini sent beinleiðis frá sjálvari finaluni í kappingini, og tað fer Sjónvarpið eisini at gera í ár. Men haraftur-at fáa fólk so eisini hálvfinaluna, har átta bólkar kappast um trý finalupláss, beinleiðis á sjónvarpsskíggjan.

Útvarpið hevur verið við til øll tey innleiðandi umførini, og manningin hjá Útvarpinum verður aftur á staðnum, tá ið hálvfinalan verður í Suðuroynni leygarkvøldið. Útvarpið byrjar eisini at senda klokkan 21.00.

# FUT LEGGUR AFTURAT



**Fríggjakvøldið skipar FUT fyri konsert í TB-húsinum, har nakrir av bólkunum, sum hava verið við í Prixnum í ár, spæla**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Suðuroyingar fáa ovmikið av livandi tónleiki at lurta eftir um vikuskiftið.

Leygarkvøldið spæla átta teir bestu bólkarnir í Prix Føroyum í hálvfinaluni, sum verður í ítróttarhøllini í Trongisvági, men longu fríggjakvøldið kunnu fýra aðrir bólkar hoyrast á palli.

Tað er Føroya Undirhaldstónleikarafelag (FUT), sum skipar fyri konsertini. Fýra bólkar, sum vóru við í innleiðandi umførum í Prixnum í ár, men sum ikki komu víðari, fara at spæla á konsertini.

Bólkarnir eru Paradox, EGR2PLZ, Side Effect og SIC.

FUT er ein av fyrireikarunum av Prix Føroyum, og konsertin fríggjakvøldið verður eitt slag av upptakt til spennandi kappingina leygarkvøldið.

# ARNOLD OG RÓGVI ÚT Í EITT

**Teir tríggir bólkarnir, sum Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu spæla við, skulu á pallin beint eftir hvønn annan**

Tveir av tónleikarunum til Prix-hálvfinaluna hava mundandi meira at gera enn hinir.

Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu eru við í trimum Prixbólkum, og lutakastið lagaði seg soleiðis, at hesir bólkarnir skulu spæla beint eftir hvønn annan.

Fyrsti bólkurin hjá teimum báðum fyrrverandi Føstufressunum er Kristleif Zachariassen, síðani kemur GoGo Blues og so Terji Rasmussen.

Rógvi á Rógvu og Arnold Ludvig hava møguleikan at koma í sjálva finaluna í Prix Føroyum við einum ella fleiri bólkum – ja, teir kunnu í grundini koma at spæla í øllum finalubólkunum.

# JONHILD SETIR PRIX-TILTAKIÐ

**Tað verður Jonhild Andreasen Nielsen, ið setir Prix Føroyar tiltakið, tá semifinalan fer av bakkastokki í Trongisvági leygarkvøldið**

PRIX 05
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Jonhild Andreasen Nielsen setir Prix Føroyar tiltakið, tá semifinalan verður í Trongisvági leygarkvøldið
Mynd: D. Olsen

Tá semifinalan í Prix Føroyar kappinigini 2005 fer av bakkastokki í Trongisvági leygarkvøldið, verður tað Jonhild Andreasen Nielsen, ið setir tiltakið.

Jonhild er varalimur í Tvøroyrar Býráð, og er inni í løtuni. Hon er m.a forkvinna í mentanarnevndini hjá býráðnum.

Men Jonhild er eisini kend songkvinna og hon var við til fyrtsu prixkappingina í 1995. Tá var tað saman við bólkinum JúMen, so hon er ikki ókend í prixhøpi.

Síðani hevur hon roynt seg í ymsum høpi, m.a. við tveimum fløgum saman við manninum Knút H.. Nielsen. Hesar ganga undir heitinum Anno. JúMen er eisini kent fyri sína útgávu av Meg minnist eina Mynd á eini av útvarpsfløgunum.

Í dag er hon virkin í bólkinum Blanding og í Suðuroyar Gospelkóri.

# TEIR ROYNDU SPÆLA SÍÐST

**Lutakastið til hálvfinaluna í Prix Føroyum lagaði seg soleiðis, at Terji Rasmussen og Eyðun Nolsøe spæla seinast av teimum átta bólkunum**

Lutakastið til hálvfinaluna í Prix Føroyum var miðskeiðs í hesum mánaðinum, og tað fall soleiðis út, at teir báðir mest royndu luttakararnir í kappingini skulu spæla seinast á kvøldinum.

Terji Rasmussen Band er nummar 7 og Eyðun Nolsøe nummar 8 av teimum 8 bólkunum.

Teir ungu tónleikararnir í Lama Sea skulu spæla fyrst, síðani koma All That Rain, Lawetz, Makrel, GoGo Blues og síðani Terji og Eyðun.